## VIÐMERKINGAR

# Til Gerhard frá Bill

BILL JUSTINUSSEN
Løgtingsmaður



**Tað harmar meg, at Gerhard Lognberg og undirritaði, sum standa lið við lið í flestu etisku spurningum, í bløðunum síggja út til at vera ósamdir. Lat tað vera sagt, at vit báðir framvegis eru samdir um tað allarmesta, tó at onkur munur er, treyðugt so, sigur Bill Justinussen**

Gerhard Lognberg undrast í lesarabrævi um mína støðu til hansara útsagnir um tey samkyndu. Tíverri er onkur misskiljing íkomin, tí eg havi ikki nevnt nakað um, at Gerhard burdi verið sendur í geglið, og um tíðindafólkið hevur fingið tað burturúr telefonsamrøðuni við meg, so taki eg tað í meg aftur og biði um orsaka, tí tað var ikki tað, sum eg meinti.

Men fyri at rudda allar misskiljingar av vegnum, skal eg her stutt greiða frá míni meining um ítøkiliga spurningin um at nokta lærarum starv, um teir eru samkyndir. Eg taki ikki undir við at nokta fólki alment starv orsakað av teirra kynsligu orientering. Ongin ivi skal tó vera um, at sum ein persónliga trúgvandi hevði eg ynskt, at øll, sum undirvísa og uppala børn vóru trúgvandi. Men tað krav kann eg ikki seta, tí tað er upp til fólk sjálvi at avgera. Eg meti tað eisini vera í stríð við ta samfelagsskipan, sum vit øll eru ein partur av, at nokta fólki sama rætt til starv, um tey lúka vanligu treytirnar fyri starvssetan. Persónligir eginleikar eru sjálvsagt ein týðandi partur av einihvørji starvssetanarviðgerð, men hetta eru altíð persónligir eginleikar, sum verða settir í mun til førleikan at røkja starvið. T.d. er tað ikki ein fyrimunur hjá einum umsøkjara at hava alkoholtrupulleikar.

Nøkur viðurskifti eru felags fyri øll í okkara samfelag. M.a. hava øll somu skyldu at gjalda skatt. Eisini eru vit samd um, at øll hava sama rætt til arbeiði. Og tá talan er um almenn arbeiðspláss, harímillum fólkaskúlan, er ongin ivi um, at øll hava sama rætt til at fáa starv, uttan mun til persónliga støðu annars. At nokta samkyndum hendan rætt er at gera mismun á fólki, og tað tekur Miðflokkurin ikki undir við. Ein av orsøkunum til, at vit ikki vildu taka undir við broyt-ingaruppskotinum til revsilógina var júst, at vit ikki meta, at mismunur er í samfelagnum. Tí metti eg tað fyri mín part vera neyðugt at gera vart við hesa støðu. Og tá ið Gerhard Lognberg sigur sína meining um júst hendan spurningin, kunnu fleiri helst halda, at hinir løgtingslimirnir, sum eisini atkvøddu ímóti broytingaruppskotinum, hava somu støðu sum hann. So er tann spurningurin vónandi greiður.

Tað er ein erlig søk at hava eina støðu, og ongin skal ivast í, at eg virði Gerhard fyri hansara týðandi leiklut í øllum hesum málinum. Eisini kann eg leggja afturat, at útsagnirnar hjá honum eru í alt ov stóran mun yvirtulkaðar bæði av fjølmiðlum og flokki hansara.




Móttøka verður í skótahøllini
2. februar kl. 16-19. Øll eru vælkomin.

80 ára skótaveitslan í Hoydølum
leygardagin 4. februar kl. 18
við døgurða, undirhaldi og dansi.

Gamlir skótar og úlvar eru vælkomnir.

Atgongumerki á 150 kr. kunnu bíleggjast á fartelefon 211030, 219418 ella 214463 í seinasta lagi mikukvøldið 1. februar, ella keypast í skótahøllini mána-, týs- og mikukvøldið kl. 19-21.

Berin:

# Sjálvhjálparbólkar fyri børn og ung

TÍÐINDASKRIV

Nú byrja vit aftur við nýggjum sjálvhjálparbólkum fyri børn og ung, sum hava mist foreldur ella syskin við deyða. Aldurin fyri luttøku er frá 8 ár og uppeftir.

Higartil hava millum 50 og 60 børn og ung verið við í sjálvhjálparbólkum.

Bólkarnir eru ætlaðir sum ein hjálp, til at fáa ein liviligan gerandisdag. Bólkurin veitir ikki akutta kreppuhjálp. Tí skal nakað vera fráligið, síðani avvarðandi doyði.

Vanliga umleið tveir mánaðir. Hinvegin sær tað ikki út til, at tíðin kann blíva ov long.

Ung, sum hava mist foreldur ella syskin fyri fleiri árum síðani, hava eisini havt gleði av bólkunum.

Tíðin gongur skjótt, og arbeiðið við sjálvhjálparbólkum er drúgt. Tey, sum vilja verða við frá byrjan, vera tí biðin um at siga frá sum skjótast. Tað kann gerast hjá Annu Dalsgaard á tlf. 319552/5195552 ella T-postur janna@kallnet.fo, og hjá Jóngerð Poulsen á tlf. 316419/227074 ella T-postur jongerd.poulsen@skulin.fo.

## Nissan Patrol



3.0 TD, 180 HK, árg. 2002, alla eykaútgerð,
so sum: Sóltak, hita í setrunum, aircondition,
aut. gear og leðursetur.
Eyka sett av breiðum dekkum fylgir við.

Tel 508018 / 320130

Sosialurin Sosialurin i Sosialurin Sosialurin

## GLASTREVJABÁTUR TIL SØLU



35 fót glastrevjabáturin, Huldusteinur til sølu við fiskiloyvi, um hóskandi boð fæst. Báturin varð longdur fyri einum ári síðani, og er í sera góðum standi. Motorurin er ein 4 ára gamal Solé, 155 HK. Báturin er sera væl útgjørdur við allari vanligari nautiskari útgerð umframt línum, snellum og aðrari útgerð.

**Nærri fæst at vita við at ringja á:
tlf. 773302 ella 269616**

## Familjulega

Tvær familjulegur vera í
Leguhúsinum í Nesvík í februar

| | |
|---|---|
| Lega 1: | 17.-19. februar |
| Lega 2: | 24.-26. februar |

Prísur: 700 kr. fyri alla familjuna
Allar familjur eru vælkomnar!
Tekning hjá Debes Andru Christiansen
á tel 452019 (best eftir kl. 19), ella
á teldupost: karl-m@post.olivant.fo.

Tekningarfreistin er úti á midnátt 2. februar 2006.



Sosialurin
www.sosialurin.fo